# K. nr. 125 frá 01.10.1990 um skúlabókasøvn.

Smbr. løgtingslóg nr. 56 frá 9. juni 1988 um megin-, fólka- og skúlabókasøvn, hevur landsstýrið fyrisett:

§ **1.** Skúlabókasavnið hevur til endamáls at styðja ta dagligu undirvísingina og geva næmingum skúlans atgongd til bøkur og annað hóskandi tilfar á tílíkan hátt, at bókasavnstilfar verður ein sjálvsagdur táttur í virki næmingsins.

§ **2.** Skúlabókasavnið skal í minsta lagi fevna um handbókasavn, flokka- og bólkasavn og savn við undirvísingaramboðum og skal harumframt hava úrval av føgrum- og yrkisbókmentum. Dentur skal verða lagdur á, at bókavalið er hóskandi til ta dagligu undirvísingina.

*Stk. 2.* Skúlabókasavnið kann fevna um ymist sjón- og ljóðtilfar og annað nýtiligt bókasavnstilfar, eins og tað kann hava námsligan verkstað.

*Stk. 3.* Skúlabókavørðurin skipar fyri tilfarskeypi til skúlabókasavnið. Um fólkabókasavn er á staðnum, skal tilfarskeypið fara fram í samstarvi við tað.

*Stk. 4.* Skúlanevndin góðkennir eftir tilmæli frá lærararáðnum tilfarið til skúlabókasavnið.

§ **3.** Alt lán frá skúlabókasavninum skal verða skrásett.

*Stk. 2.* Neyðugt bókasavnstilfar, sum ikki er í skúlabókasavninum, skal verða lænt frá øðrum bókasøvnum.

*Stk. 3.* Í kommunum við fleiri skúlabókasøvnum kann harumframt verða skipað felags skúlabókasavn, haðani allir skúlar í kommununi kunnu læna tilfar, flokkasøvn o.a.

§ **4.** Undir ábyrgd skúlaleiðarans og eftir tilmæli hansara setir skúlanevndin ein av lærarum skúlans at hava ta dagligu leiðsluna av skúlabókasavninum. Um skúlin bert hevur ein lærara, hevur hann ta dagligu leiðsluna.

*Stk. 2.* Á fult árgangsbýttum skúlum og framhaldsskúlum skal tann lærari, ið settur verður, annaðhvørt hava fingið sær útbúgving sum skúlabókavørður ella, áður enn eitt tíðarskeið, sum landsskúlafyrisitingin ásetir, er farið, fáa sær hesa útbúgving.

*Stk. 3.* Á øðrum skúlum skal skúlabókavørðurin hava nomið sær neyðugan førleika til tess at røkja hetta starv.

*Stk. 4.* Eftir tilmæli skúlaleiðarans kann skúlanevndin seta skúlabókavørðinum hjálparfólk, um tørvur er á tí. Hjálparfólkið, ið somuleiðis skal vera lærari á skúlanum, skal hava nomið sær sama førleika, sum ásettur er í stk. 3.

§ **5.** Skúlabókasavnið skal vera í egnum hølum ella í hølum í felag við fólkabókasavnið.

§ **6.** Bý-/bygdarráðið skal á hvørjum ári senda landsskúlafyrisitingini 2 eintøk av fíggjarætlan og grannskoðaðum roknskapi fyri skúlabókasavnið til góðkenningar.

*Stk. 2.* Fíggjarætlan og roknskapur skulu vera góðkend av landsskúlafyrisitingini, áðrenn studningur sambært stk. 2 verður goldin.

*Stk. 3.* Landsskúlafyrisitingin sendir bókastovuni, samanber kap. 5 í løgtingslóg og megin-, fólka- og skúlabókasøvn, ta góðkendu fíggjarætlanina og tann góðkenda roknskapin til nýtslu, tá studningur verður goldin.

§ **7.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

FØROYA LANDSSTÝRI, 1. oktober 1990

**Signar Hansen** (sign.)
landsstýrismaður

/ Jákup Thorsteinsson (sign.)